# Grønlendska barnabókin tilnevnd

**Grønlendska og føroyska boðið uppá Barnabókavirðislønina hjá Útnorðurráðnum er almannakunngjørt. Nú vantar bert íslendska boðið**



*Tríggjar barnabøkur fara at kappast um at vinna fyrstu Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins. Kuffi er føroyska boðið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BARNABÓKA-VIRÐISLØN
*Turið Kjølbro*

Nú er eisini grønlendska boðið uppá Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins 2002 greitt. Tað er barnabókin Sialuarannguaq eftir Jørgen Petersen.

Føroyska barnabókin varð tilnevnd í farnu viku. Tað er bókin Kuffi eftir Brynhild Andreasen við tekningum hjá Astrid Mac Donald. Kuffi er ævintýr, har hetjurnar skulu prógva fyri sær sjálvum og umheiminum, at tær við hegni, vísdómi og styrki megna at vinna á stórum forðingum og trupulleikum. Megna tey uppgávuna, so bjarga tey bæði sær sjálvum og sínari ætt. Hesin frásøguháttur skapar spenning og fremur lesihugin, sigur ummælisnevndin. Bókin kom út í fjør og er tann fyrsta hjá høvundinum. Føroyska ummælisnevndin, sum er mannað av Helenu Dam á Neystabø, Oddfríði Rasmussen og Oddvør Johansen, hevði einar fimtan føroyskar barna- og ungdómsbøkur at velja ímillum á hesum sinni.

Íslendska bókin verður tilnevnd í næstum.

Allar tríggjar bøkurnar, sum vera í uppskoti til Barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins 2002, verða nú umsettar til føroyskt, íslendskt og grønlendskt umframt til eitt skandinaviskt mál.

Um góðan mánað ella so verður avgerð tikin um, hvør bókin fær heiðurin, og virðislønin verður handað á ársfundinum hjá Útnorðurráðnum, sum verður í Íslandi í august í ár. Virðislønin er 60.000 kr.

Tað var á ársfundi í Útnorðurráðnum fyri tveimum árum síðani í Íslandi, at avgerð varð tikin um at seta á stovn eina Barnabókavirðisløn. Endamálið við stovnanini er at stuðla bókmentirnar í Útnorði og at stimbra teir høvundar, sum evna til børn.

# Mannarættindastøðan gjørd upp

**Mannarættindastøðan í hálvt annað hundrað londum er gjørd upp í nýggjastu ársfrágreiðingini hjá Amnesty International**




*Hendan kvinnan hevur júst fingið deyðadóm. Hon varð avrættað í Changzhou í Kina í apríl í fjør. Í tíðarskeiðnum apríl-juli í fjør vórðu 1781 fólk avrættað í Kina, sum er meiri enn restin av londunum í heiminum hevur avrættað tilsamans seinastu trý árini*

ÁRSFRÁGREIÐING
*Turið Kjølbro*

Nýggjasta ársfrágreiðingin hjá Amnesty International er ikki hugaligur lesnaður. Í øllum førum ikki, um vit bert hyggja at mannalívum, sum eru farin í árinum, sum fór, annaðhvørt av krígsávum, yvirgangi, píning, rasismu ella øðrum orsøkum.

Støðan í Ísrael, sum mest er at hoyra um í fjølmiðlunum í løtuni, verður eisini nevnd. Har stendur eitt nú, at meiri enn 460 palistinar vórðu dripnir í fjør av ísraelskum trygdarliðum. Millum hesi vóru 79 børn og 32 einstaklingar, sum doyðu í sjálvmorðsatsóknum. Yvir 2000 palistinar vórðu handtiknir av trygdarávum. Løgreglan gjørdi seg inn á fólk, bæði við harðskapi úti í almenninginum og meðan fólk vóru í varðhaldi. Palistinskir bólkar drupu 187 ísraelsfólk, íroknað 154 sivil.

Í ársfrágreiðingini hjá Amnesty International, sum varð almannakunngjørd í gjár, verður greitt frá gongdini í fjør, tá talan er um mannarættindi. Frásagnir eru um brot á mannarættindini í 152 londum. Serliga verður dentur lagdur á gongdina síðani 11. september, tá ið vesturheimurin fór í kríggj móti yvirgangi og stjórnir fóru at velja og vraka ímillum mannarættindi. Amnesty International hevur í hesum sambandi heitt á allar partar um at virða mannarættindini undir slagorðinum: rættvísi, ikki hevnd.

Frágreiðingin, sum er á enskum, byrjar við fororði frá Irene Khan, aðalskrivara. Síðani er ein inngangur, sum stutt lýsir gongdina, m.a. í Ísrael og hersettu økjunum og í Afghanistan. Greitt verður eisini frá um ymisk evnir, m.a. krígnum móti yvirgangi, rasismu, píning og deyðarevsing.

Størsti parturin av ársfrágreiðingini fevnir um landafrágreiðingarnar, har mannarættindastøðan í 152 londum nágreiniliga verður tilgjørd.

Fólk kunnu seta seg í samband við Amnesty International Føroya Deild at frætta meir. Ársfrágreiðingin er eisini tøk á heimasíðuni hjá Amnesty International: www.aamnesty.org



Jens Marni sloppin gjøgnum nálareygað:

# – Eg royni at hanga í

*Jens Marni Hansen, fyrrverandi sangari í All That Rain, er sloppin ígjøgnum fyrsta umfar í Pop Stars-kappingini, sum TV2 skipar fyri*



**Jens Marni Hansen, sum í hesum døgum roynir seg í sendingini Pop Stars, sum TV2 skipar fyri er sloppin ígjøgnum fyrsta nálareygað. Hann er millum tey umleið 50 fyrstu, sum eru vald út til annað umfar**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Fyrrverandi limurin í Kjølum og All That Rain, Jens Marni Hansen, er í hesum døgum í Keypmannahavn. Her melur hann ímillum upptøkutól hjá TV2, og er við í sendingini Pop Stars, sum gongur út uppá, at finna ein solist. Fyrsta upptøkuroyndin var mánadagin, og var Jens Marni ein av teimum útvaldu, sum varð filmaður frá einum enda í annan.

– Eg kom til Danmarkar sunnudagin, men mánamorgunin skuldi eg út aftur til Kastrup á flogvøllin, har tað so skuldi síggja út sum eg kom við flúgvaranum. Tey fylgdu so við mær frá Kastrup inn til Cirkusbygningin har eg skuldi stilla meg í eina bíðirøð fyri at sleppa inn, greiðir Jens Marni frá.

Tá komið varð inn í Cirkus-bygningin vóru sjey og sjey tikin út, har tey fyrst skuldu inn í eitt rúm fyri seg at royna seg fyri einum fordómara. Har vóru tey vánaligastu sáldað frá áðrenn tey sluppu víðari inn til tann veruliga dómaran. Eini 50-70 vóru eftir sum sluppu inn til dómaran at vísa síni kynstur. Fimm og fimm skuldu á pallin í senn at syngja fyri dómaranum.

– Fýra konufólk og eg skuldu upp at syngja, og har var tað bara eg, sum slapp víðari, sigur Jens Marni.

## Verri nú

Nógv verður tosað um, at tað er verri at sleppa ígjøgnum nálareygað nú enn tað var í undanfarnu sendingini.

– Ein av gentunum, sum skuldi upp á pallin tá eg skuldi, var eisini við í fjør. Tá slapp hon víðari ígjøgnum fyrsta umfar, men tað slapp hon ikki hesuferð, so ein kann siga, at tað er strangari hesuferð, enn seinastu ferð, sigur kollfirðingurin.

Jens Marni metir, at støðið er ymiskt.

– Tað ber væl til at siga, at nógv vánalig eru við. Fleiri eru við bara fyri at royna tað, og so verður støðið eisini har eftir. Har havi eg tann fyrimunin, at eg havi verið bæði í sjónvarpi og á palli fyrr, og tað tekur tað ringasta av nervunum vekk, greiðir fyrrverandi regnmaðurin frá.

– Sjálvandi hevði eg nervar, tá eg skuldi syngja, tí tað var jú fyri einum dómara, men mínar royndir hjálptu mær væl.

Jens Marni sigur, at hann hugsar ikki so nógv um at gerast tann eini, ið verður valdur út. Hann sigur, at um hugsað verður soleiðis, so ger dreymurin bara nervarnar verri.

– Ringt er at siga, hvørjar vónir eg havi. Tá tað kemur til sang, haldi eg, at eg eri væl fyri, men so er tað tað, hvat teir vilja hava. Um teir vilja hava eina klokkuklára rødd ella eina rødd, ið kann variera eitt sindur. Men tað veit eg so ikki, men má bara gera tað, sum er mín besta sannføring.

## Keating og George Michael

TV2 hevur valt nøkur burturúr at filma, og er Jens Marni ein teirra. Eitt sindur meira verður gjørt burturúr honum, eftirsum hann er einasti føroyingur, ið er við í kappingini.

– Tey hava filmað meg nógv, men tað hugsi eg ikki so nógv um. Tey gera sær dælt av, at ein føroyingur er við, og allan mánadagin vóru upptøkutól rundan um meg.

Til fyrsta umfarið hevði Jens Marni valt at syngja Angels hjá Robbie Williams. Í morgin, hósdagin, tá hann aftur skal til eina upptøku roynd hevur hann tríggjar aðrar sangir at velja ímillum. Hesuferð væntar hann, at tað verður Lovin´ Each Day hjá Ronan Keating, ið skal standa fyri skotum.

– Teir báðir hava ikki klokkuklára rødd, men klára at sjarmera seg ígjøgnum sangin á ein annan hátt, so tað verður tað, sum eg fari at miðað ímóti. Tað, sum eg gjørdi eitt sindur býtt mánadagin var, at áðrenn eg fór inn, so hevði eg drukkið so nógv danskt vatn, har nógv kálk er í. Hetta gjørdi, at hálsurin hjá mær var alt ov turrur tá eg skuldi syngja, men tað eydnaðist mær so í øllum førum at koma heilskalaður ígjøgnum tað, greiðir Jens Marni frá.

Hinir luttakararnir vístu seg at vera ógvuliga positivt yvirraskaðir av kollfirðinginum. Hvørja ferð onkur hevði sungið, varð klappað fyri teimum, og tá Jens Marni hevði sungið fyri dómaranum vórðu lógvabrestirnir nógvir.

– Tað var ógvuliga stuttligt at hoyra, og hetta hjálpir eisini uppá sjálvsálitið, sigur Jens Marni. – Og har havi eg, sum sagt, kanska onkur ting, sum onnur ikki hava – royndirnar av at standa á palli.

Men hvussu nógv vit fara at hoyra víðari frá Jens Marna er ilt at siga. Hvør veit um vit yvirhøvur fara at hoyra nakað áðrenn sendingin verður víst á TV2 í heyst. Upptøkuroyndir vera í Århus hósdagin í næstu viku, og nú hósdagin skal Jens Marni aftur royna seg. Men hann sigur, at frá nú av ber ikki til hjá honum at koma við so nógvum upplýsingum, tí hetta tilfarið skal jú brúkast í sendingunum hjá TV2 í heyst.

– Eg kann verða saksøktur við fleiri milliónum um eg gevi ov nógvar upplýsingar út, so frá nú av ber ikki so væl til at koma við detaljum, sigur Jens Marni Hansen at enda í telefonini úr Keypmannahavn.

# Tað kann loysa seg

**Onkuntíð verður troffið beint, tá veddingarspøl eru á skránni, og tá kann vinnarin ofta fáa munandi pengingaupphæddir**

VEDDING
*Jákup Mørk*

Av og á kemur tað fyri, at stórir vinningar eru at fáa í ymsu veddingarspølunum.

Eitt av hesum spølum er sonevnda »måljagten« hjá donsku TipsTænastuni.

Her ræður um at gita úrslit í nøkrum fótbóltsdystum, og møguleikin at vinna stórar peningaupphæddir er oftani stórur í hesum spæli. Sjálvsagt tí tað er munnandi verri at gita úrslit í dystum, heldur enn bert at gita, hvør vinnarin verður.

Onkuntíð verður tó kollgitt, og fyri góðari viku síðani var í øllum førum ein heppin føroyingur, sum gitti rætt.

Úrslitið gjørdist, at vinnarin gjørdist nakað væl ríkari. Sum skeltið sigur, so vóru »oddisini« fyri veddingina 174.838, og tað merkir, at innskotið, sum er latið, fær hepni veddarin afturgoldið 174.838 ferðir aftur. Er innskotið ein 10-króna, er talan sostatt um 1,75 mió.kr.




*Skeltið úti hjá Gunnleivi við Landavegin boðar frá, at her hevur ein kollgitt og vunnið pengarnar hjá sær 174.838 ferðirnar aftur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR**

**Nissan Almera 1,5 Comfort**
reyður, 5 hurðar,
árg. 2000.
**115.000**

**Nissan Almera 2,0D GX**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 118.000 km.
**100.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1998.
**135.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
**69.000**

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
**47.000**

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
**78.000**

**Peugeot 106 Diesel**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1996, 110.000 km.
**72.000**

**Peugeot 206 XRD 1,9**
bláur, 3 hurðar,
árg. 1999, 60.000 km.
**112.000**

**Peugeot 206 XR 1,4**
svartur, 3 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
**100.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Opel Combo 1,4 Van**
hvítur, 3 hurðar,
árg. 1997, 52.000 km.
**59.000**

**Opel Astra 1,7dt Van**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 106.000 km.
**50.000**

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**105.000**

**Opel Astra 1,7 Wagon**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 142.000 km.
**55.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
**26.000**

**Opel Vectra 1,8**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 29.000 km.
**129.000**

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
**130.000**

**Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin